Skúlastýrisfundur 18. mai 2026

Tíð: Kl. 17.00–18.30

Møtt: Theodor Eli Dam Olsen, Mass Hoydal, Anna Maria Reinert Jensen, Margith Lamhauge, Trygvi í Liða, Annita á Fríðriksmørk og Elin Maria Olsen.

1. Nýtt um bygging av nýggjum skúla

Frá bygginevndini varð kunnað um, at ein ella tveir fundir hava verið síðan seinasta skúlastýrisfund. Bygginevndin og skúlastýrið í Hoyvíkar skúla taka undir við at leggja skúlarnar saman, meðan skúlastýrisformaðurin við Løgmannabreyt hevur verið ímóti hesum.

Fyristøðufólk eru farin at greina, hvussu ein samanlegging kann fremjast. Eitt tilmæli um, hvørt skúlarnir skulu leggjast saman, væntast miðskeiðis í juni.

Mett verður, at lonirnar kunnu nýtast sum skúlastovur aftur. Ein møguleiki er at seta tær á parkeringsplássið við Skúlan við Løgmannabreyt (SVL), um samstarv verður millum skúlarnar. Soleiðis ber eisini til at nýta felagshølini hjá SVL. Ein annar møguleiki er at nýta hølini hjá FC Hoyvík til skúla, tá ið tey eru liðug.

Skúlin er ikki teknaður enn, og tí verður hetta ikki sett í verk í summar.

Á fundinum varð víst á, at málið snýr seg um meira enn sjálvan skúlan. Tað snýr seg eisini um at styrkja felagsskapin í Hoyvík við skúlanum sum savningarstaði.

Somuleiðis varð umrøtt, at skúlar kunnu skipast á aðrar hættir enn við deildarbýti. Í nýggja skúlanum skal vera rúm fyri førleikastovu, bólkarúmum o.ø.

2. Samanlegging av skúlunum

Semja er í skúlastýrinum um at taka undir við eini samanlegging av skúlunum.

3. Málnýtsla, ítróttur o.a.

Í sambandi við umrøðuna av málbrúki varð nevnt, at skúlastýrið við Løgmannabreyt ikki hevur somu trupulleikar. Anna Maria skjeyt tí upp at spyrja tey, hvussu tey hava arbeitt við hesum.

Trygvi hevur tosað við Liljan, sum fegin vil samstarva við skúlan um eitt átak. Enn er ikki greitt, hvussu átakið skal skipast.

Anna Maria skjeyt eisini upp at taka H71 við upp á ráð.

Alment dannilsi varð somuleiðis umrøtt, m.a. møguleikin at taka støði í, hvussu hvør skúladagur byrjar.

4. Trivnaðarkanning og trivnaðararbeiði

Trygvi í Liða hevur borið fram ynski um eina trivnaðarkanning. Læraraumboðið greiddi frá at ein slík trivnarkanning hevur áður verið gjørd, og tá hon varð løgd fram, var torført at halda dulnevnt, hvør hevði sagt hvat.

Skúlastjórin greiddi frá, at skúlin er í eini tilgongd og hevur fingið nøkur viðurskifti at arbeiða við. Ein trivnaðarkanning er anonym, tí fáa vit so illa um endan.

Vit tosa við umboð vegna starvsfólkini, og arbeiða m.a. við einum greiðari leiðslustrukturi og at kunna betri.

Í umrøðuni varð dentur lagdur á, at leiðslan hevur ábyrgdina av at stýra tilgongdini. Ein arbeiðssálarfrøðingur kann stuðla arbeiðinum, men ábyrgdin liggur hjá leiðsluni. Eisini varð eftirlýst, at leiðslan tekur ítøkilig stig, sum vísa starvsfólkunum, at tey verða hoyrd.

Í sambandi við mentanarbroyting varð víst á, at verandi høli eru tey bestu, sum hava verið til taks. Samstundis hava vánalig hølisviðurskifti ávirkan á gerandisdagin, og tað ger arbeiðið við at broyta mentanina torført.

Anna Maria hevur søkt um ljóðplátur og veggir til lítlaskúla.

Fundurin lokin kl. 18.30.